## DAGSINS MEINING

# Hvat skal valið snúgva seg um!

Eftir øllum at døma er Fogh vitjanin vorðin startskotið til valstríðið. Skulu vit ganga eftir orðunum hjá løgmanni í Sosialinum, metir hann lyklaorðið í valstríðnum vera ferðin á yvirtøkum. At seta dagskránna til valstríðið, eru tað helst fleiri enn løgmaður, ið vilja. Tað rætta er at lata Føroya fólk seta hesa dagskrá, og tað gert bert við at lurta eftir, hvat rørist í fólkinum. Hvør sigur tey halda, at tað skal snúgva seg um yvirtøkur, heldur enn um at betra umstøðurnar hjá vinnuni og hjá fólkinum sum heild.

Limirnir í arbeiðarafeløgunum og í arbeiðsgevarafeløgunum, fiskimenn, stjórin á Fiskavirking, flakakvinnurnar á Eiði, arbeiðsmenninir á Tvøroyri, dekkararnir á Brimli, lærararnir í Ósáskúlanum, pensionistarnir í Hvalba, borifólkini í Vágatunlinum osfr. eru fólkini og ikki sitandi politikararnir, sum skulu seta dagsskránna til komandi løgtingsval. Politikararnir hava skyldu til at fara út til fólkið at vita, hvat rørist í samfelagnum, hvussu hvør einstakur livir og hugsar. Tað er skylda teirra alla tíðina at taka pulsin á fólkinum, á samfelagnum. Tað vil altíð vera ein vandi í, at politiska umhvørvið er so “sammenspist”, at tað livir av tí beru returinformatión, tvs. at politikararnir hava nokk í sær sjálvum og hvørjum øðrum. At fólkini, ið hava valt teir, líkasum fara í gloymskuna, tí ávís hjartamál hjá ávísum politikarum taka alla orku og tíð – uttan at hesi neyðturviliga eisini eru hjartamál hjá fólkinum. Sjálvandi hava politikararnir skyldu til at seta út í kortið, men ikki bara einsamallir. Er tað ikki nettupp hetta vit hava sæð hetta valskeið, har tað hevur eydnast einum flokki at seta kílar millum Føroya fólk við at bólka tey í fullveldisfólk og ikki fullveldisfólk – tað góða móti tí ringa. Hvítt ella svart. Antin ella. Politikarar og fólk, ið vilja brúka millumloysnir og konsensuspolitikk at byggja samfelagið á, eru skýrd vánaligir føroyingar og nú eisini grenj.

Sami flokkur roynir nú eisini at misbrúka oljuna í valstríðnum. Sambart ÚF skal okkara fíggjarmálaráðharri hava sagt við Morgunblaðið, at vit fáa sjálvstýri um 4 ár, tí tá fara oljuinntøkur at avloysa blokkpengar. Tað undrar, at maður, ið annars ber varsemi í sínum skjølduri, nú brádliga skal blanda oljuinntøkur, sum vit enn einki vita við vissu um, uppí komandi fullveldistøku. Tað er óbúgvið og ábyrgdarleyst. Fíggjarmálaráðharrin veit, at tað ganga í minsta lagi 8-10 ár, áðrenn føroyska samfelagið fer at fáa munandi inntøkur frá møguligari olju. Og hann veit eisini, at eingin í dag veit við vissu, um lønandi nøgdir av olju finnast her. Álíkavæl fer hann út og erklerar føroyska statin at gerast veruleiki um 4 ár, tí olja kann avloysa blokk. Latið fólkið seta dagskránna og ikki slíkar politikarar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Havnarskatt

**Heðin Mortensen,**
*løgtingsmaður*



Mín kæri vinur Eivin Jacobsen (tann í Sørvági) helt, at havnarfólk skuldu gjalda 25.000 krónur um árið fyri at eiga hús á bygd.

Samstundis hoyra vit í miðlunum, at nú fara fleiri fólk at flyta vestur í Vágar, tí tað fer at bera so væl til at búgva har vesturi og arbeiða í Havn.

Álvaratos! Sum er, verður triðingurin av øllum lønum, sum verða forvunnar í Havn, skattaður á bygd. Tórshavnar kommuna skal asfaltera vegirnar, so píkaskøddir bilar av bygd kunnu koma til Havnar hvønn einasta dag til arbeiðis. Tórshavnar kommuna skal gjalda fyri allar kommunalar tænastur, sum bygdarfólk brúka, tá tey eru í Havn, um tað so er til arbeiðis ella í almennum ørindum.

Tað er frítt at arbeiða, eiga ognir, ferðast og búgva allastaðni í landinum. Sjálvt um Eivin vil skatta okkum, so ætla vit ikki at seta bumm upp í Kollfjarðardali at krevja pengar frá teimum, sum hava ørindi í Havn.

Tá Eivin gevur havnarfólki ábyrgdina fyri húsaprísin á bygd er tað púra burturvíð. Ongin fer illa, um annar fer væl. Um vit ikki áttu rætt at byggja ella eiga hús á bygd, so vóru somikið færri vælhildin hús til á bygd. So einfalt er tað. Havnarfólk mugu keypa hús fyri hálva aðru millión. Men tey geva ikki bygdarfólki skylduna, tí bygdarfólk leggja arbeiði og hús undir seg í Havn.

Um Eivin vil gera eina nøggja skipan fyri kommunal tænastugjøld, so er tað ikki ómøguligt. Men, vit skulu øll vera í hesum landinum, og tað kemur tí ikki upp á tal at leggja nakran "havnarskatt" á fólk.

# Skattalætti v.m. til pensionistar

**Jacob Vestergaard**
*formaður í Føroya Kommunufelag*



Nakað av orðaskifti hevur tikið seg upp millum kommunupolittikarar um útspælið hjá landsstýrinum viðvíkjandi pensionistunum.

Eg haldi tað ikki vera sømuligt at viðgerða málið soleiðis, at ein fær tað fatan, at pensionistarnir eru okkum ein byrða, og kosta okkum ov nógvar pengar. Tað hava pensionistarnir ikki uppiborið. Tey hava bygt hetta landið upp, og lagt grundarlagið undir vælferðarsamfelagið.

Bætin er hart tiltrongdur, og vónandi verður meir gjørt á hesum økinum framyvir.

Eldraøkið er í dag ein landsuppgáva burturav, og eigur tað tí at vera landið, sum ber allar útreiðslur av økinum, tað verði seg pensjónir, búð- og røktarpláss v.m.

Tað er ikki rætt, at skattalættar, frádráttir v.m., sum Løgtingið gevur borgarum, skulu ávirka kommunalu fíggjarætlaninar. Slíkar útreiðslur eiga at verða fíggjaðar yvir landsfíggjarlógina.

Hetta var eisini niðurstøðan í “Kommunuálitinum”, og er aftur staðfest í álitinum um “uppgávu- og ábyrgdarbýti millm land og kommunur”, sum løgmaður fekk handað í desember mánað í fjør.

Álitið mælur til, “at skattaskipanin hjá kommunum fyri fysiskar persónar verður so einføld, sum til ber, m.a. at kommunuskattur verður álíknaður persónligu skattskyldugu inntøkuni. Hetta merkir, at landið rindar allar frádráttir: FAS, landskassafrádrátt, rentufrádrátt, skattalætta til sjófólk og at tað bara er landsskatturin, sum verður ávirkaður av skattaloftinum, ið ásett er o.s.fr. Kommunurnar eiga at verða skaðaleysar av umbýti og frádráttum í skattaskipanini, tó so at barnafrádrátturin eigur at verða borin av kommununum, so leingi tær áseta hann sjálvar”.

Landið hevur sett strong krøv til fíggjarstýring í kommununum, t.v.s. at kommunurnar so neyvt sum til ber, gera fíggjarætlanir, sum niður í smálutir lýsa, hvussu innkravdi kommunuskatturin verður nýttur. Tað er tí óskiljandi, og í mótsøgn við ætlaða politikkin, at umrøddi skattalætti partvís skal leggjast yvir á kommunurnar. Tað er lætt hjá landsstýrinum at geva skattalætta, tá kommunurnar skulu bera kostnaðin.

Fíggjarmálaráðharrin hevur eisini úttalað seg um málið, men eftir úttalilsunum at døma, hevur hann ikki innlit í viðurskiftini millum land og kommunur, og tí skal eg ikki gera viðmerkingar til tað, bert siga, at kommunurnar ikki skylda landinum nakað, heldur tvørturímóti.

Um landsstýrið meinar nakað við tað sum sagt verður um framtíðar kommunalu skipanina, við fleiri kommunalum uppgávum, eigur landstýrið at hugsað seg um, áðrenn ætlaði skattalættin verður lagdur á kommunurnar.

Tað fer ikki at bera til hjá kommununum at yvirtakað fleiri økir frá landinum, um tær ikki hava fult ræði á sínum fíggjarviðurskiftum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

Eitt ár í býráðnum 2:

# Bústaðir og grundstykkir

**Jógvan Arge**
*býráðslimur í Havn fyri tjóðveldisflokkin*



Stórt trýst er á Tórshavnar Kommunu at fáa grundstykki og bústað. Fólkatalið er vaksið nógv, og hugurin at sleppa at búgva í Havn er ovurstórur.

Byggivirksemið hevur rættiliga tikið dyk á seg - ikki minst sethúsabyggingin á bæði kommunalt og privat útvegaðum grundstykkjum.

Tað merkja vit í byggi- og býarskipanarnevndini, sum er tann nevnd í Tórshavnar Býráð, ið hevur havt nógv flest mál til viðgerðar hetta seinasta árið. Fundirnir hava verið ikki færri enn 28 í tali..

Bíðilistin at fáa grundstykki til keyps frá kommununi veksur dag um dag. Nú um ársskiftið stóðu eini 700 nøvn á bíðilistanum. Mong eru eisini, sum keypa hús og grundstykki frá privatum útvegarum.

Nýggj kommunal útstykking er komin í gongd. Tórshavnar Kommuna hevur bjóðað 175 stykkir út í Hoyvíkshaganum.

Tað gekk skjótt at selja tey fyrstu 130 stykkini, sum eru til stakhús á stykkjum, sum eru 500, 400 og 300 fermetrar. 31 stykkir eru 500 fermetrar, 45 eru 400 fermetrar og 54 eru 300 fermetrar.

Seinast hevur kommunan boðið út 43 bústaðir í samanbygdum húsum omanfyri hini 130 grundstykkini. Hesi seinastu eru randarhús í nýggjum sniði. Har verða seks lonir við millum fimm og níggju húsum í hvørjari.

Eigarafelag er stovnað fyri hesa útstykking, og væntast kann, at tey fyrstu fólkini kunna flyta inn um eitt ár.

**Nýggjar íbúðir á Berjabrekku**

Leingi hevur verið talað um alternativar bústaðir til fólk at leiga. Tað gongur striltið at útvega hesar øðrvísi bústaðirnar, tí lóggávan er illa lagað til stórt annað enn vanliga sethúsabygging.

Nógv sethús krevja stórt lendi, og sethús seta stór krøv til peningapungin. Mong høvdu óivað verið nøgd við eina íbúð, sum kostaði knapt so nógv at reka sum eini heili hús, men hetta tykist ikki vera so lætt at bera í bandi.

Tórshavnar Kommuna hevur saman við Húsalánsgrunninum í einum sjálvsognarstovni tikið stig til eina ætlan at byggja einar 60 lutaíbúðir á Berjabrekku.

Tekningarnar eru gjørdar, og tingingar eru við avvarðandi myndugleikar um fíggingingarmyndilin.

Byggiætlanin hevur søkt landsstýrið um, at hon sleppur undan at rinda mvg av arbeiðslønini eins og tey, sum byggja sethús, og at hon fær rentustuðul á sama hátt sum húsaeigarar.

Karsten Hansen, landsstýrismaður, segði nú ein dagin á tingi, at hann prinsipielt er fyri, at leigarar verða settir javnt við eigarar. Men fyri at hetta kann lata seg gera, er neyðugt, at landsstýrið semist um at gera hetta í einum breiðari høpi.

Meir er ikki frætt um málið.

**Ætlanir í framtíðini**

Ætlanin er at halda fram við útstykkingum í Hoyvíkshaganum. Har skula útvegast møguleikar fyri at byggja einar tríggir býarpartar aftrat, so Hoyvíkshagin einaferð kann verða býur við eini 6000 fólkum.

Har skal gerast miðbýur við handilsgøtu og øðrum útbúnaði, so hagafólkinum ikki nýtist at fara heilt oman til Havnar at gera síni dagligu ørindi.

Somuleiðis skula byggjast skúli, barnagarðar, eldrabústaðir og annað, sum hoyrir býarumhvørvum til.

Hesar ætlanir hava ikki verið til nágreiniliga viðgerð í byggi- og býarskipanarnevndini enn, og fyri ein part liggja tær í arbeiðnum ”Havnin í framtíðini”, sum ráðgevarafelagið Rambøll Nyvig er farið undir fyri Tórshavnar Kommunu.

Men við tí stóra eftirspurningi, sum er eftir bústaðarmøguleikum í Havnar Kommunu, verður tann næsta kommunala útstykkingin óivað boðin út, áðrenn tað stóra plánleggingararbeiðið er liðugt.

Aðrar leiðir at byggja býin út verða eisini nevndar. Ein er at byggja fast í Norðasta Horn framvið Velbastaðvegnum og aðrir at útvega grundstykkir í teimum mongu bygdunum í kommununi.

Hugsað eigur eisini at verða um møguleikar saman við Kirkjubøar Kommuna, sum hevur víst áhuga fyri samarbeiði við Tórshavnar Kommunu.

**Nógvar privatar ætlanir**

Aftrat tí, sum kommunan er beinleiðis uppií, er bygging av eini 400 húsum og íbúðum í gongd og í umbúna ymsastaðni í kommununi í løtuni.

# Kommunali skúlin í Trondheimi ein vánalig fyrimynd

**Eyðólv Dimon**



Í seinastu viku royndi eg at rópa varskó mótvegis ætlanunum hjá Landsstýrinum at leggja fólkaskúlan út til kommunurnar. Eg fekk tvær viðmerkingar, sum báðar stuðlaðu landstýrinum. Eg vísti á at tað finnast ongi dømi úr grannalondunum, sum vísa at tað er ein fyrimunur at leggja skúlarnar út til kommunurnar at umsita, men nógv eru dømini um tað øvugta. Hetta fekk Ásbjørn Lómaklett, skúlastjóra at skriva ***”Klaksvíkar kommuna hevur tætt skúlasamstarv við vinarbýir sínar: Kópavog, Odense, Norrkøping, Trondheim, Østersund og Tampere. Hesar kommunur umsita allar fólkaskúlar sínar, og tað er einki, ið bendir á, at kommunurnar ikki megna uppgávurnar á skúlaøkinum, heldur tvørturímóti”***

Ì lokalu fjølmiðlunum í Trondheimi eru nógvar ræðusøgur um hvussu kommunan vanrøktar skúlan, og eg skal tó bara vísa tvey dømi úr fjølmiðlinum Adressa, tí hesi siga alt.

**5.okt. 01 skrivar Adressa**

”Ógvisligastu sparingarnar verða á skúlaøkinum, barnaverndarøkinum og samferðsluøkinum. ……… játtanin til skúlaøki verður 30 milliónir kr. lægri, og hetta fer at raka veikastu næmingarnar sera meint.”

**21.nov. 01. skrivar Adressa**

”Í Trondheimar kommunu er alt arbeiði í samband við viðlíkahald av skúlum afturútsiglt, og fleiri av skúlunum eru nú so illa fyri, at teir ikki lúka krøvini í samb. við inniklima o.a. Fíggjarstøðan hjá kommununi loyvir ikki, at nóg nógvir pengar verða settir av til hetta arbeiði.”

Í somu grein verður sagt ”Hin kendi meklarin Ivar Koteng vil nú keypa skúlar í Trondheimi, pussa teir upp fyri síðan at leiga kommununi teir aftur til undirvísing.” ”Koteng sigur sjálvur, at hansara egnu børn hava merkt avleiðingarnar av vánaligu umstøðunum í skúlunum, og tí kemur hann við hesum tilboðið.” Varðaborgmeistarin Frank Jenssen, (Høyre) sigur í somu útgávu av Adressa, at tilboðið frá Koteng er spennandi.

Til seinast skal eg vísa á, at ein kommunalur skúli í Trondheimi, sum varð afturlatin seinni er opnaður aftur sum barnagarður. Í fjør rapaði partur av takinum á barnagarðinum, men til alla lukku vóru børnini uttandura. Nú kann lesarin so meta, hvussu góð fyrimynd Trondheimi er ella hvussu væl kommunan megnar uppgávurnar á skúlaøkinum.

**Javnbjóðis rætt til skúlagongd og útbúgving.**

Hesi dømi eru úr verðins ríkasta landi. Eitt land har statskassin flýtur yvir í pengum, meðan fleiri av kommununum eru illa fyri. Kommunur, sum eru í fíggjarligari trongstøðu, er ikki eitt ókent fyribrygdi í Føroyum. Sera ymiskt er eisini hvønn týdning kommunurnar leggja í at hava ein nútíðarskúla. Fylgjurnar av einum kommunalum skúla gerast tí, at næmingarnir fáa eitt sera ymiskt skúlatilboð, sum hjá nógvum fer at merkja ein vánaligari fólkaskúla. Tí er Javnaðarflokkurin hart ímóti, at skúlin verður lagdur út til kommunurnar. Eitt av málunum við okkara skúlapolitikki er, at øll skulu hava javnbjóðis rætt til skúlagongd og útbúgving uttan mun til fíggjarviðurskifti, ella hvar í landinum vit búgva. Hetta kann ikki sameinast við ætlanina at lata kommununar yvirtaka skúlan.

**Landið skal umsita skúlan.**

Javnaðarflokkurin mælir hinvegin til, at landið verður skipað í hóskandi økir. Eitt økisráð verður valt við beinleiðis vali, samstundis sum val er til kommunustýrið. Økisráðið skal røkja ávís mál í økinum sambært fíggjarætlan, sum landsstýrið viðger og góðtekur, og løgtingið játtar. Uppgávur hjá økisráðnum er m.a. at gera langtíðarætlanir fyri skúlaverkið í hóskandi millumbilum. Her verður hugsað um bygging o.a. neyðugar stórar íløgur, eins og ymiskar royndarskipanir.

Landið skal umframt fíggjarliga partin taka sær av uppalingarligu skipaninum og setan av lærararum. Eisini verður tað landið, sum Lærarafelagið skal samráðast við.


**Tøkk**

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Heðin Wardum,**
**Tórshavn**

so brádliga varð kallaður heim til Harran.
Tøkk til Sonju Klein prest fyri tey troystarríku orð, sangarar, berarar og familju fyri ta hjálp, tit vístu okkum í okkara stóru sorg. Tøkk til tann stóra mannskara, ið fylgdi honum til hansara seinasta hvíldarstað. Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur.
Tøkk tit øll, sum hjálptu til við ervinum.

*Familjunar vegna*
**Randi og børnini**

**Tøkk**

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og góða hjálp, tá góða mamma, vermamma og omma okkara

**Samuelina Olsen,**
**ættað úr Mikladali**

doyði og varð jarðað.
Ein serlig tøkk til øll tykkum, sum trúliga vitjaðu og vóru um hana, tá hon lá sjúk.

**Elsba, Poul Andreas, Marjun, Poulina og Árni**